SKÚLIN FLØTUM

15. november 2024

# Skipandi skúlastýrisfundur

Møtt á fundi: Erla, Snorri, Poula, Derhard, Regin
Forfall: Eingin
Fundarlongd: 15-16

Skrá

1. Regin bjóðar vælkomin og greiðir frá valinum
2. Derhard leggur frá sær og greiðir frá leiklutinum og innihaldinum í leiklutinum. Derhard gjøgnumgongur væntaðu arbeiðsbyrðuna sæð í bakspeglið.
3. Erla, Snorri og Poula skipa seg í forfólk og varaforfólk og stýrislimur.
4. Ymiskt herundir fundarskipan og áseting av fyrsta fundi

## Ad.1

Kunning um uppteljing, kærumøguleikar og formalitetir.
Kunning av verandi arbeiði og reglugerð um skúlastýri
Lýsing av málum í viðgerð. Kantina, tekja, Vitlíki og KT-ætlan
Komandi skúlastýrið er mannað av Erlu B Nolsø, Poulu Paturson og Snorra Paturson, ið eru foreldraumboð.
Sjúrður J Ravnsfjall er starvsfólkaumboð.
Skúlastýrið er fullmannað, tá tvey kommunustýrsumboð eisini eru vald.

## Ad.2

Derhard greiðir frá at starvið er gevandi og er væl skipað.
Fundirnir eru oftast styttri enn 2 tímar. Alt er greitt frammanundan fundi við skrá og tað verður gjøgnumgingið og viðgjørt ordiligt.

Vanliga eru 6 fundir árliga og harumframt eru setanir.
Tað eru vanliga 2-3 umfør av setanum árliga.

Felagsforeldrafundurin árliga er skipaður av skúlastýrinum. Tá verður formansfrágreiðingin eisini løgd fram. Frammanundan honum kalla foreldraumboðini foreldraráðið saman.

Harafturat eru tað av og á foreldur, ið venda sær til stýrið við málum. Tað kann vera við uppringing ella við telduposti. Aðrar tíðir eru tað prát í óformligum samanhangi.

Forfólkið verður í byrjanini av setanini eisini innkallað til eitt skúlastýrisforfólkaskeið. Tað verður viðmælt og er gevandi.

Í stuttum er talan um ein post, ið krevur nakað og gevur enn meira.
Hann riggar væl saman við fulltíðarstørvum og familjulívi, tí hann er ikki tungur.
Men hann krevur, at man dugir at umboða foreldrini í síni heild. Ikki bara seg sjálvan og sínar partar av skúlanum.

Ad.3

Foreldraumboðini skipa seg soleiðis, at Erla verður forfólk og Snorri verður varaforfólk.
Tey mæla til, at Poula er umboð í setanum í Gulaskúla og Lopfjølini, meðan Erla er umboð í setanum á Fløtum. Snorri er varafólk fyri bæði.

Ad.4

Samtykt at halda fram við somu fundarskipan. Hósdagar kl 16-18.
Regin kallar inn umvegis teldupostskipanina.
Samskiftið er umvegis teldupost.
Regin kunnar um, at Skúlin á Fløtum í ongum formellum samskifti nýtir aðrar pallar enn SMS, teldupost og Teams. Tískil er onki samskifti í skúlastýrinum á FB ella á messenger ella líknandi platformum.

Semja er um at kalla inn, tá nýggja skúlastýrið er fullmannað við umboðum fyri kommununa.
Helst verður hetta í januar.
Tá verður fær fráfarandi formaðurin eisini eina heilsan fyri væl útynt arbeiðið í 8 ár sum limur og formaður í skúlastýrinum.

Fundur lokin